# Tiltøk

**Konfirmantarnir í Christianskirkjuni várið 2011**
Byrja at ganga til hósdagin 18. nov. kl. 17 í kirkjukjallaranum. Tey fáa tilfar, tímaætlan og foreldrini eru vælkomin við.

**Makrelur - eitt stríðsmál í Norðurhøvum**
Mikukvøldið kl. 19 skipar Norrøna Felagið í Føroyum fyri kjak- og kunningakvøldið, har Jan Arge Jacobsen, fiskifrøðingur, og Andrass Kristiansen, deildarstjóri í Fiskimálaráðnum lýsa bakgrundina fyri, at samráðingarnar um býtið av makrelkvotuni er vorðið eitt stríðsmál millum londini í Norðurhøvum. Tiltakið er alment.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikukvøldið kl. 19 í KFUM: Ten-sing venur. Hetta er fyri ungdómin.
Hóskvøldið kl. 19.30 í KFUK: Vit gera klárt til basarin.
Leygardagur kl. 15 í KFUK: Basarur.

**Lívdin í Skúlanum við Løgmannabreyt**
Sunnudagur Familju- og tilbiðjanarmøtið byrjar kl. 10.30 og lovsongur og tala kl. 12. Sunnudagsskúli, unglív og barnaansing er meðan seinna møti er kl. 12 Á seinna møtinum kl. 12, talar Jógvan Zachariassen um "2010 familjan – Tá hjúnarbandið slitnar" Hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Mikudagur kl. 20 Felagskóri venur
Hósdagin kl. 16 Venur gentukórið. kl. 20 Ungdómsmøti v/ Cambodja toymið 2010
Øll eru vælkomin

**Fríkirkjan Oasan**
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøtið
Fríggjakvøldið kl. 20 After8
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta v/Magnus Simonsen kl. 12 Sunnudagsskúli.

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Hósdagur kl. 20
Bíbliutími evni: Málaki 4.

**Aglow í Havn**
bjóðar til nátturða og jólahugna á Hotel Føroyum sunnukvøldið kl. 19.30. Luttøka verður við Rúnu & Heðin Lamhauge og sangbólkinum Quinto. Kostnaður 100 kr. Tilmelding við at senda sms ella at ringja á tlf.: 259396, 252942 ella 261460. Kvinnur og menn verið hjartaliga vælkomin!

**Samkoman Immanuel, Brekkutún 5, Hoyvík**
Mikukvøldið kl. 20 Møti v/ Høgna Johannesen. Evnið; Trúarverja. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum. Verið vælkomin.
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, møti fyri børn frá 8 ár og uppeftir. Øll verða koyrd heim eftir møti. Kl. 21; Herur Jákups, umgdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Felagið fyri hoyribrekað hevur limafund**
Hósdagin 18. nov. kl. 19 MBF-húsið, Íslandsvegur 10C, Tórshavn.
Bjarki Ellefsen, oyrnalækni og Anja Skipper-Eriksen, audiologiassistentur á Hoyriklinikkini luttaka á fundinum og svara spurningum. Kaffi og køka fæst. Øll vælkomin.
www.hoyribrek.fo

**Gongutúrur**
Sunnudagin verður gongutúrur: Djúpagilsvegur, Inn á Gøtu, nýggi Ringvegurin í Havn. Farið verður kl. 10 av Tórsbreyt, har túrurin eisini endar. Tilmelding á tlf. 302425 á torsinfo@torshavn.fo ella á Kunningarstovuni.

**Samkoman Marknagil, Fjalsg.2, Tórshavn**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími: evnið: Hebrearabrævið.
Sunnumorgun kl. 10.30 Breyðbróting. Kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti
Hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia Tórshavn**
Mikudagin
Kl. 16.30 Bøn fyri Ísrael og býnum. Kl. 18 Delli.
Fríggjadagin kl. 07.15 Morgunbøn. Kl. 20 Mammur hittast til bøn
Leygardagin Kl. 21 Flare
Sunnudagin Kl. 11 Morgunmøti. Kl. 13.15 SundagsKool.

**Ebenezer**
Mikudag kl. 20 Bønar- og lærumøti.
Hósdag kl. 15.45-16.45 Sangevenjing – Gentukórið Kassia. Kl. 20 Ungdómsmøti. Sjúrður Olsen talar.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing er í Lítla Sali. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelikst møti. Barnaansing er í Stóra Sali

**Hebron**
Mikudagin kl. 10 bønarløta fyri kvinnur. Kl. 17.30 nátturði. Kl. 18.30 bønarmøti fyri familjuna.

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Mikudagin
Kl. 15 Bønarmøti
Kl. 19 Cellegruppa fyri menn
Hósdagin
Kl. 20 Heimaforbundið
Sunnudagin
Kl. 11 Halgunarmøti v/Sunnudagsskúla
Kl. 17.30 Bøn
Kl. 18 Møti

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Mikukvøldið kl. 20
Bøn- og sangløta.

**Frelsunarherurin Vágur**
Mikudagin kl. 14.30 barnakór/ arb. Kl. 20 møti v/ Poul-William og Margaret Marti Økisleiðara. Eisini minna vit á árasøluna sum verður onsdagin 1. des. kl. 19.

**Missiónsvika í Bø**
Fríggjakvøldið kl. 20 Torleif Johannesen talar og Gunnleyg syngur. Leygarkvøldið kl. 20 Gullakur og Jóhilda luttaka við talu og sangi. Sunnudagin kl. 15 Familjumøti og kl. 20 Bergur Debes talar og Lovinda syngur. Hjartaliga vælkomin.

**Eysturoyar Gongufelag**
Skipað verður fyri jólaborðhaldi leygardagin kl. 19.30 á Sjókafèini. Sí meira um luttøku á heimasíðu felagsins www.eystgong.net

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikukvøldið kl.19.30 Bønarmøti. Kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Hósdagin kl. 17.30 Liljur

**Keldan, Skálafirði**
Felags vikuskiftismøtir við luttøku frá ymiskum samkomum verða leygarkvøldið kl. 20.

**Aglow Eysturoy**
Alment jólamøti verður í Kelduni í Skálafirði fríggjakvøldið kl. 20. Talarar: Svenhild og Harald Haraldsen. Sangur: Oasubrøðurnir. Øll eru vælkomin - kvinnur og menn, ung og gomul.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudag Kl. 06 Bøn. Kl. 20 Bíbiltími. Evni: 1 Pæt Br. 4
Fríggjakvøld kl. 21 Ungdómsmøti v/Jórun Danielsen

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 19.30 Dreingjabønarbólkurin.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti við Róa Norðoy.
Leygarkvøldið kl. 20 Felagsmøti í Kelduni.
Sunnukvøldið kl. 17 Felagsmøti í Kelduni.

**Getsemane, Stangaskákið 1, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Møti í skúlanum á Fossanesi. Ólavur Jacobsen talar, ung hava vitnisburð og dráma
Leygarkvøldið kl. 20 Møti í skúlanum á Fossanesi
Rói Norðoy talar, Heini Lútzen leiðir lovsang.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti í Getsemane. Barnamøti er samstundis.

**KFUM & K í Klaksvík**
Mikudagin kl. 20 Bíbliutími
Leygadagin kl. 10 Marknaðardagur

**Missionshúsið á Viðareiði**
Fríggjakvøldið kl. 19.30 Niels Andreassen og Óli Poulsen tala og syngja.
Leygarkvøldið kl. 19.30 Regin Høgnesen truboðari talar Streingjakóirið í KFUM & K í Klaksvík syngur.
Øll hjartaliga vælkomin

**Bethel, Vágur**
Fríggjakvøldið kl. 21.30 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti. John í Skemmuni og aðrir tala. Ymisk sangluttøka
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting Kl. 12.30 Sunnudagsskúli Kl. 18 Evangeliskt møti.

Talarar úr oynni. Suðuroyarkórið syngur. Barnaansing verður meðan møti er. Øll eru vælkomin til hesi møtir.

**Tvøroyar kirkja**
Mánakvøldið 22. nov. kl. 19 verður jólakonsert við Lindu Andrews. Eisini koma børn úr Trongisvágs skúla at medvirka. Innsavnað verður fyri tiltakið.

**Missiónsvikan í Porkeri**
byrjar onskvøldið við guðstænastu í Porkeris kirkju. Jónsvein Bech, prestur prædikar og Streingjakórið syngur. Hon heldur fram tórskvøldið kl. 20 í Missiónshúsinum við Jógvan Højgaard og Ragnar Mortensen. Streingjakórið syngur. Fríggjakvøldið tala Eivind Beck og Árni Kjærbæk.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag – hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Hósdagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið vegleiðing kl. 15 – 16 Arnhold Fjalstein.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Lesibólkurin hittast 25. nov. Vit lesa: "Uden tittel", Kristín Marja Baldursdóttir. Øll, ið hava áhuga í bókmentum eru vælkomin.
Kl. 14 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Fríggjadag
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn hjartaliga vælkomnir.
Kl. 10-13 Matklubbur. Byrjar fríggjadagin 5. nov. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga
OBS !!! Kl. 16.30 Kvøldseta. Brota og bitar í 100 ár. Yrkingar, prosa, sangir og hugleiðingar. Lagt til rættis: Linubólkurin í Havnar Sjónleikarafelag. Hjálp og vegleiðing: Birita Mohr. Fylgispæl: Simme
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
*Limirnir koma saman í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøld kl. 19, tá ikki annað er lýst. Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
• Aðalfundur felagsins verður í Losjuni mikukvøldið 17. nov. kl. 19.

**Føroysk advent- og jólaguðstænasta í Aalborg Klosterkirke**
Sunnudagin, hin 28. nov. kl. 14 verður føroysk guðstænasta í Aalborg Klosterkirke. Aftaná guðstænastuna fáa vit ein drekkamunn í grannalagnum. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Lisbeth Solmunde Michelsen, prestur í Vodskov*

# Merkisdagar

## Diamantbrúdleyp

Tórsdagin 18. nov. hava Irena og Kristian Olsen, Porkeri, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin heima frá kl. 11 til kl. 15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Diamantbrúdleyp

Hósdagin 18. nov. hava Nelly og Otto Sørensen, Tórshavn, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Diamantbrúdleyp
Fríggjadagin 19. nov. hava Ásla og Markus Heinesen, Haraldssund, diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

## Gullbrúdleyp
Fríggjadagin 19. nov. hava Elisabeth og Páll Ellingsgaard gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eiðisstovu sama dag frá kl. 8 til kl. 13. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Silvurbrúdleyp
Týsdagin 7. des. hava Joanita og Jan Jacobsen Saltangará silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálafirði týsdagin 7. des. kl. 18. Tey ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 747547 áðrenn 3. des.

## Silvurbrúdleyp
14. des. hava Joan og Elias Hammer Haldórsvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Hósvík 18. des. kl. 19. Tey ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin at siga frá á tlf. 213447 ella 423447 innan 10. des.

## 90 ára føðingardagur

Mikudagin 17. nov. fyllir Dagmar Johannesen, Glyvrar, 90 ár.

## 90 ára føðingardagur
Bernhard Jacobsen, á Miðgerði, Kollafirði, verður 90 ár tann 24. nov. Dagurin verður hildin á Tjarnagarði í Tórshavn frá kl. 17 – 21. Øll vælkomin.

## 80 ára føðingardagur

Leygardagin 4. des. fyllir Kata Mortensen, 80 ár. Dagurin verur hildin á hotell bakkanum í Vági, leygardagin tann 4. des. kl. 18. Øll ið vilja verða við til at halda dagin kunnu boða frá á tlf. 373261, 259561 ella 267628 innan 27. nov.

## 70 ára føðingardagur

Onsdagin 1. des. fyllir Marna Olsen, Vágur, 70 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 27. nov. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 65 ára føðingardagur
Fríggjadagin 17. des. fyllir Kamma Johannesen, Trongisvágur, 65 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum frá kl. 18. Tey ið ynskja at halda dagin saman við mær verða biðin um at siga frá á tel. 372872 innan 5. des.

## 60 ára føðingardagur
Týsdagin 16. nov. *fylti* Jan Ellebye Andersen, Klaksvík, 60 ár. Dagurin verður hildin 20. nov. kl. 19 í kantinuni í Tekniska Skúla. Hjartaliga vælkomin.

## 60 ára føðingardagur

Hensia Einarsson fyllir 60 ár fríggjadagin 19. nov. Dagurin verður hildin leygardagin 20. nov. millum kl. 11 og 17 á Tjarnargarði, Hoyvíksvegur 58 (Marinustøðin).